# Frankenstein frumsýndur í Atlantis

**Klaksvíkar Sjónleikarafelag, sum hesar seinastu tveir mánaðarnar hevur vant dúgliga í Atlantis, fer leygardagin 2. november kl. 16.00 at frumsýna leikin Frankenstein**

TÍÐINDASKRIV

Í dag klokkan 16 fer Klaksvíkar Sjónleikarafelag á pallin við sjónleikinum Frankenstein fyri fyrstu ferð. Tíggju leikarar eru við í hesari uppsetingini, sum Jákup Veyhe hevur leikstjórnað við kønari hond. Hetta eru einamest royndir og garvaðir áhugaleikarar við nógvum royndum á palli, tó so, eru eisini onkur nýggj stjørnuskot á veg.

Danin Thomas Malling hevur umskrivað kendu skaldsøguna hjá Mary Shelley til skemtileik. Leikurin er ein so kallað svørt komedia ella ein "crazy farca", men við einum álvarsligum innihaldi. Hon viðger millum annað hóttanina, sum vísundin er ímóti mannaættini. Og at avleiðingar standast av vantandi víðskygni og tolsemi. Orðasnillingurin og Føroya besti táttayrkjari, Andreas Justesen av Viðareiði, hevur føroyskað.

Til frumsýningina er longu útselt, men komandi vikurnar verður so høvi hjá øllum norðoyingum at vitja Atlantis og stytta sær stundir saman við Klaksvíkar Sjónleikarafelag. Síðani verður farið út at ferðast við leikinum.

Tað er einki at taka seg aftur í, at Klaksvíkar Sjónleikarafelag aftur í ár er garanturin fyri, at nakað veruligt verður at flenna at á føroyskum sjónleikarpallum.

# Æðuvíkingur í Kanada fyllir 100

**Kristian Sofus Davidsen fór úr Føroyum í 1927, 25 ára gamal, og hevur ongantíð verið vitjað í Føroyum aftur**

FØÐINGARDAGUR
*Vilmund Jacobsen*

Mikudagin komandi fyllir æðuvíkingurin, Kristian Sofus Davidsen, 100 ár. Hann er føddur, 6. november 1902.

Kristian Sofus er sonur fyrstu niðursetufólkini í Æðuvík, Jóannes Davidsen, ættaður av Gørðum á Nesi og Sonnu, fødd Müller, úr Porkeri.

Sum 25 ára gamal fór hann yvir til Kanada at finna sær arbeiði, og hóast 75 ár nú eru liðin, hevur hann ongantíð vitjað í Føroyum aftur.


*Kristian Sofus Davidsen*

### "Burtur" í fleiri ár

Kristian Sofus er abbabeiggi Dia Ellindson, sum vitjað á Sosialinum fríggjadagin og bar okkum tíðindini um føðingardagsbarnið.

Soleiðis, sum Dia hevur skilt, hevði familjan í Føroyum samband við Kristian Sofus fyrstu tíðina eftir, at hann var komin yvir til Kanada.

- Men síðan frættist einki aftur frá abbabeiggjanum í nógv, sigur hann.

Við tíðini fór familjan í Føroyum at ivast í, hvussu vorðið mundi vera við Kristian Sofusi.

- Tey fóru tískil at eftirlýsa mannin, og tað gav at enda úrslit, greiðir Dia frá.

Síðan familjan om eftir, at Kristian Sofus framvegis búði í Kanada, hava nøkur av ættarfólkunum verið har yviri og vitjað hann.

### Yvir at heilsa føðingardagsbarninum

Nú føðingardagurin verður mikudagin, eru nøkur fólk í familjuni farin yvir at vitja Kristian Sofus og heilsa honum á 100 ára degnum.

- Sum eg havi skilt á teimum, sum hava vitjað í Kanada, kennist Kristian Sofus framvegis við okkurt einstakt navn úr Føroyum, men føroyska málið er langt síðan skift út við tað enska, tey tosa har yviri.

Dia Ellindsson sigur, at Kristian Sofus í fleiri ár hevur búð hjá eini danskari familju, og børnini í húsinum hava verið góð við hann og hava rópt hann "abbi".

Kristian Sofus Davidsen er ógiftur.

Í dag býr hann á einum ellisheimi.

Dia Ellindsson veit eisini at siga, at ein systir Kristian Sofus, Elisabeth Margrethe Mortensen, sum býr á Tvøroyri , fyllir 90 ár, 12. februar 2003.




Meginfelag Búnaðarmanna varð stovnað í 1977. 45 fólk starvast hjá fyritøkuni í dag. Deildirnar eru:

Mjólkurvirki Búnaðarmanna, Hoyvík

MBM-Fóður, Kollafirði

MBM-Kjøt, Hósvík

Fyrisitingin saman við Sølu- og Tænastu í Búnaðardeplinum í Kollafirði.

Endamál felagsins er at veita mjólk, mjólkarúrdráttir og kjøt til tann føroyska marknaðin, og eisini í hesum sambandi at veita fóður, brúkslutir og tænastu til landbúnaðin.

Meginfelag Búnaðarmanna søkir eftir

**Samskipara av innkeypinum**

Meginfelag Búnaðarmanna er ein fyritøka í støðugari menning, og okkum tørvar tí eitt starvsfólk til at taka sær av innkeypi, prískalkulatión og goymslustýring (logistikki).

MBM bjóðar eitt starv við nógvum spennandi uppgávum, eitt nú at

- Vera samskipari av øllum innkeypi hjá deildum felagsins
- Fasthalda og menna verandi mannagongdir í sambandi við innkeyp
- Hava ábyrgdina av goymslustýringini og syrgja fyri at goymslan verður hildin á einum ræðiligum stigi
- Syrgja fyri at keypandi eftirlit verður gjørt av goymsluni
- Syrgja fyri prískalkulatiónum
- Hava eftirlit við gjørdum avtalum við flutningsfeløgini
- Syrgja fyri tollavgreiðslu av øllum vørusendingum

Vit søkja eftir einum starvsfólki, sum hevur lætt við at samstarva við onnur starvsfólk.

Umsøkjari, sum hevur útbúgving í logistikki hevur fyrimun, men tað er tó ongin treyt.

Kunnleiki til teldu krevst, og nýtir MBM Navision Financials bókhaldskipanina og Microsoft Office.

Løn sambært avtalu. Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 15. november 2002 og skal umsøkjarin helst kunna byrja í starvinum tann 1. januar 2003.

Hevur tú hug at vita meira um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Dánjal Thomsen, fíggjarleiðara, ella Karl á H. Andreasen, skrivstovuleiðara.

MBM

Meginfelag Búnaðarmanna · Búnaðardepilin · 410 Kollafjørður · Telefon 479000




# Havsbrún nýggja turku, størri smiðju og nýggja atløgu

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Nú lágsesong er hjá nótavinnuni, kemur ikki nógvur fiskur upp á land á Havsbrún í Fugalfirði. Men fyri tann skuld er nógv virksemi á virkinum og uttan um.

- Í okkara vinnu er há-og lágárstíð, og nú gera vit okkum til reiðar til komandi vertíð, sigur Poul H. Sólstein á virkinum.

Langt er millum landingarnar á Havsbrún, nú flestu nótaskipini liggja, men síðsta mánadag var russiski trolarin, Murman, við 1700 tonsum av svartkjafti.


*Nú líður væl við nýggju atløgubryggjuni, sum Havsbrún letur byggja frammanfyri fóðurdeildina. Hetta verður ein bryggja, sum í fyrsta lagi skal nýtast til upp-og avskiping.*
Mynd: Vilmund Jacobsen

### Nýggj turka

Poul H. Sólstein sigur, at teir í løtuni eru í holt við at seta upp eina nýggja turku, sum hann rópar tað. Virkið hevur frammanundan tríggjar turkur til turking av mjøli, og hendan fjórða verður so sett upp í framhaldi av hinum, sum frammanundan eru.

- Nýggju turkuna hava vit keypt úr Noregi, og tað eru íslendingar, sum seta hana upp á virkinum.

Poul sigur, at nýggja turkan turkar við lægri hita enn tær gomlu og fer tískil eisini betri við mjølinum, sum fær eina betri góðsku.

- Vit hugsa okkum at fáa ein betri prís fyri hetta mjølið úr hesi nýggju turkuni, men enn vita vit ikki, hvussu verður við tí.

Hann væntar, at nýggi útbúnaðurin, sum verður settur uppí verandi hølum, verður liðugur at taka í nýtslu um ársskiftið.

### Havnalagið

Á Havsbrún eru teir eisini í holt við at byggja eina nýggja bryggju frammanfyri fóðurdeildini á virkinum.

Hetta verður ein bryggja til upp-og avskiping, sum er stívliga 50 metrar long.

- Vit byggja hesa bryggju sjálvir í samráð við Fuglafjarðar kommunu og gera síðan avtalu við kommununa um raksturin av henni, sigur Poul.

Hann vísir á, at íløgukarmurin hjá kommununum er trongur, og at Havsbrún hevur størri bryggjupláss fyri neyðini.

- Tí byggja vit hava bryggju sjálvir, men fara ikki at reka hana, sigur hann.

Um kostnaðin, sigur Poul, at talan verður um nakrar miljónir.

### Størri smiðja

Á Havsbrún byggja teir eisini aftrat verandi smiðjubygningi, soleiðis at smiðjan verður størri og betur.

Poul H. Sólstein vísir á, at á einum virki sum Havsbrún, sum er í gongd alt árið, er neyðugt við viðlíkahaldi, tá ið lágárstíð er, og tí er nógv at gera í tíðum sum hesum, tá ið lítil fiskur kemur uppá land.

- Tá ið farið verður í gongd aftur eftir ársskiftið, verður talan í fyrsta lagi um lodnu og svartkjaft, sigur hann.

Á virkinum vænta tey ikki nógvar landingar tað, ið eftir er av árinum, men onkur bátur kemur inn at landa av og á.

# Væntandi verður kærunevndin endaliga avgreidd týsdagin

**- Málið er nú sent flokkunum til ummælis, og ætlandi fer landsstýrið endaliga at avgreiða málið komandi týsdag. Síðan verður tað borið niðan í tingið, sigur løgmaður, Anfinn Kallsberg**

RATIONALISERING
*Vilmund Jacobsen*

Á fundi hósdagin viðgjørdi landsstýrið í høvuðsheitum ymisk lógaruppskot, sum ætlandi skulu niðan í tingið. Sum skilst á løgmanni, Anfinn Kallsberg, var talan serliga um tekniskar broytingar og tillagingar.

- Ikki nøkur radikal broyting, sum hann tekur til.

Millum málini var tó eitt, sum er ein ávís rationalisering.


*Anfinn Kallsberg, løgmaður, sigur, at málið um kærunevnd innan skatt, toll og avgjøld og mvgætlandi verður endaliga avgreitt á landsstýrisfundi týsdagin*

Tríggjar kærunevndir hava sitið og viðgjørt kærur um ávikavist skatt, toll og avgjøld og mvg.

Nú hevur so Fíggjarmálastýrið í samráð við Toll-og Skatt skotið upp at hava eina kærunevnd, sum skal viðgera slíkar kærur.

- Hetta kunnu vit kalla eina rationalisering, sigur løgmaður, sum væntar, at tænastan hjá borgarunum ikki verður verri við einari kærunevnd heldur enn trimum.

Sum skilst á løgmanni, verður nýggja kærunevndin, sum fer at telja 5 limir, vald eftir tilmæli frá ymiskum bólkum í samfelagnum, og síðan verður onkur løgfrøðingur eisini í nevndini.

### Avgreiðast týsdagin

Løgmaður sigur, at málið nú er sent flokkunum til ummælis, og ætlandi fer landsstýrið at avgreiða tað endaliga týsdagin, tá ið landsstýrisfundur verður aftur.

- Miðjað verður eftir at leggja málið fyri tingið í komandi viku, sigur hann.

Anfinn Kallsberg sigur seg ikki vita um nakra ósemju og væntar tí ikki, at tað verður so torført at broyta kæruviðurskiftini – frá trimum nevndum til eina.

Spurdur, um talan er um sparing, sigur løgmaður at enda, at eisini hetta málið snýr seg um pening og rationalisering.

Hann dugir tó ikki at meta um, hvussu nógvan spardan pening, talan er um.


**Opið er leygardagin 2 nov. frá kl. 10 til 17 við nógvum góðum brúktum bilum.**

Landsins lagaligasta brúktbilafígging við 20% útgjald, og restina tosa vit um.

Bilfríðkan við Velbastaðvegin

WWW.bilfridkan.fo

Tlf 317300 - Fartelefonir 217300 & 211662 - 100 Tórshavn